# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum: www.sosialurin.fo

# Bara KÍ hevur fult stigatal

*Einasta liðið, sum enn hevur fult stigatal í 1. deild hjá kvinnum, er KÍ, ið nú eisini er greiður favorittur at gerast føroyameistari*



*Bára Skaale og liðfelagar hennara fyltu trý stig afturat í posan, tá Súnfríð Simonsen og hinar úr B36 vitjaðu um vikuskiftið*

***Mynd: JH***

**Máltindurin**

| | | |
|---|---|---|
| Guðrun í Lágabø | VB | 6 |
| Eyðvør úr Dímun | HB | 4 |
| Rannvá Andreasen | KÍ | 4 |
| Malena Josephsen | KÍ | 3 |
| Laila Jespersen | VB | 3 |
| Sólvá Joensen | B36 | 2 |
| Annika Godtfred | HB | 2 |
| Maibritt Olsen | NSÍ | 2 |
| Annika Poulsen | VB | 2 |
| Halldóra Joensen | VB | 2 |

adidas

STEFAN Í SKORINI

Næsta umfar í 1. deild hjá kvinnum eftir summarsteðgin varð leikt um vikuskiftið, og longu nú ber til at hóma, hvussu stigatalvan fer at síggja út, tá ið seinasti bólturin er sparkaður.

Seinasta vikuskiftið varð ein dystur útsettur, men hesuferð vórðu allir tríggir dystirnir spældir sum ætlað.

### KÍ vann trygt á B36

B36 hevur fyrr í ár verið í Klaksvík, og tá endaði tað við stórsigri til KÍ kvinnurnar, sum tá skoraðu heili níggju mál. Hesuferð vann KÍ bara 2-0, men ongantíð var nakar ivi um, hvønn veg dysturin fór at koppa. KÍ skoraði bæði málini miðskeiðis í fyrra hálvleiki, og so var dysturin í roynd og veru avgjørdur.

Fyrra málið gjørdi Vivian Bjartalíð, tá hon fekk fatur á einum innleggi frá Jensu Sirdal. Vivian helt høvdið kalt og legði heimaliðið framum. Eini tíggju minuttir seinni fekk KÍ seinna málið. Malena Josephsen fekk eina sending frá Margit Joensen, og Malena skeyt frá brotsteigarmarkinum uppum málverjan, sum var komin heldur langt út úr málinum.

KÍ hevði greiða yvirvág í fyrra hálvleiki, og teirra málverji hevði ikki serliga nógv at gera. Í seinna hálvleiki fekk B36 bóltin meira, men einki vandamikið álop stóðst av leikligu yvirvágini. Einki ivamál var um sigurin hjá KÍ, men dysturin kostaði eisini KÍ nakað, tí Rannvá Andreasen, sum í løtuni er toppskjútti hjá KÍ, varð rikin av vølli, eftir at dómarin hevði bríkslað dystin av. Hon fekk tá sítt seinna gula kort, og hon verður tískil ikki við í næsta dystinum.

Annars var nógvur vindur í Klaksvík sunnudagin, og tí var torført at fáa nakað skipað spæl í lag.

### HB vann tepurt

Í Gundadali var NSÍ á vitjan, sum seinasta vikuskiftið ikki kundi manna lið móti KÍ. Hesuferð bar til og NSÍ kvinnurnar vóru eisini nær við at skaka HB liðið.

HB vann dystin 2-1, men NSÍ var frammanfyri í hálvleikinum við máli, sum Maibritt Olsen gjørdi miðskeiðis í fyrra hálvleiki. Beint eftir steðgin javnaði Eyðvør úr Dímun fyri heimaliðið, og leingi sá út til at NSÍ skuldi fáa tað eina stigið.

Dysturin var sera javnur, og hann kundi farið báðar vegir. NSÍ hevði eitt skot á tvørliggjaran, sum eins væl kundi farið í málið, men HB kvinnurnar vildu tað øðrvísi. Tá tíggju minuttir vóru eftir skoraði Annika Godtfred sigursmálið, sum tryggjaði HB øll stigini.

HB verður kanska harðasti kappingarneytin hjá KÍ, men tað verður torført at vinna uttan Eyðvør úr Dímun, sum bara spælir ein dyst afturat, áðrenn hon fer niður.

### VB vann stórsigur

VB bukaði skálakvinnur av suðuri í Vági. Úrslitið gjørdist heili 11-0, og støðan í hálvleikinum var 7-0 til vágskvinnur. Laila Jespersen var toppskjútti við trimum málum.

VB fer við hesum sigrinum upp á fyrsta pláss við sjey stigum, men tær hava leikt ein dyst meira enn KÍ, sum hevur seks stig fyri tveir dystir. Næsta vikuskiftið skal VB standa sína roynd, tá KÍ kemur suður, og tað verður spennandi at síggja, um tær enn eru á ovastu rók eftir henda dystin.

Næsta vikuskiftið verður grannauppgerð í Havn millum HB og B36, meðan oddaliðið KÍ skal suður til Vágs uttan Rannvu Andreasen, og botnuppgerð verður á Skála, har NSÍ kemur á vitjan.

Úrslitini sunnudagin vóru hesi:

**KÍ - B36 2-0 (2-0)**
KÍ: Vivian Bjartalíð, Malena Josephsen

**HB - NSÍ 2-1 (0-1)**
HB: Eyðvør úr Dímun, Annika Godtfred
NSÍ: Maibritt Olsen

**VB - Skála 11-0 (7-0)**
VB: Laila Jespersen 3, Guðrun í Lágabø 2, Halldóra Joensen 2, Diana Dahl, Rannvá Augustinussen, Annika Poulsen, sjálvmál

**Støðan, 1. deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 3 | 2 - 1 - 0 | 16 | 3 | 13 | 7 |
| 2 | KÍ | 2 | 2 - 0 - 0 | 10 | 0 | 10 | 6 |
| 3 | HB | 3 | 2 - 0 - 1 | 6 | 9 | -3 | 6 |
| 4 | B36 | 3 | 1 - 1 - 1 | 5 | 3 | 2 | 4 |
| 5 | NSÍ | 2 | 0 - 0 - 2 | 3 | 6 | -3 | 0 |
| 6 | Skála | 3 | 0 - 0 - 3 | 0 | 19 | -19 | 0 |



# Bert eitt spildurnýtt andlit

*Sjey leikarar leiktu sín fyrsta 1. deildardyst í hesum kappingarárinum um vikuskiftið. Talan var tó bert í einum føri um spildurnýggjan leikara*



*Igoris Kirillovas var fyri fyrstu ferð yvirhøvur við í føroysku landskappingini, tá FS Vágar vitjaði í Runavík um vikuskifti*
***Mynd: Jonhard Hammer***

Tað er einki óvanligt í sær sjálvum, at føroysk feløg brúka summarsteðgin sum seinasta møguleika fyri at leita sær styrk av onkrum slag. Antin hjá teimum heimligu leikarum, ið av einari ella aðrari orsøk vóru burtur fyrru helvt av árinum, ella frá heilt nýggjum útlendingum.

Spælaraskifti millum tvey 1.deildarfeløg kan eisini koma fyri. Sum kunnugt, so flutti litavin Darius Magdisauskas úr Vágunum til Havnar, har hann við loyvi frá FSF fyri fyrstu ferð spældi við nýggju liðfeløgunum leygardagin.

Hetta er møguliga eindømi í føroyskum fótbólti, at ein útlendingur miðskeiðis í einum kappingarári flytir til annað felag í somu deild.

Eisini Flóvin av Fløtum Jespersen, ið leikti ein dyst í fyrru helvt við HB, hevur skift til B71. Havnarmaðurin á sandoyarliðnum fekk kortini ikki hjálpt B71 í vikuskiftinum orsakað av væntandi spæliloyvi frá FSF. Vit kunnu minna á, at tey bæði undanfarnur árini hevur bert ein leikari um árið skift felag, miðskeiðis kappingarárinum. Teir báðir eru Birgir Jørgensen (VB til Sumba) og Hans Jørgen Djurhuus (B71 til HB).

### Ein bræðnýggjur

Í ár er tað rættiliga merkisvert, at hóast ikki færri enn sjey leikarar hava verið á vøllinum fyri fyrstu ferð í hesari landskapping, so eru allir teirra, uttan ein, gamlir kenningar í føroyskum fótbolti. teirra høvdu ikki spælt í 1.deild í tvey ár ella meira.

HB-arar tóku fegnir ímóti Allani Mørkøre, tá ið hansara sáttmali við íslendska ÍBV bleiv settur úr gildi. Oleif Joensen er komin inn á 1.deildarliðið hjá toftamonnum fyri at avloysa verjuálitið, Jákup Eli Olsen, ið ikki verður at síggja aftur á vøllinum í ár.

Ein annar fyrrverandi landsliðsmaður, Allan Joensen, er komin fyri seg aftur aftur hann hevði verið ógvusliga skaddur, og tað sama er galdandi fyri jugoslaviska málslúkin hjá Sumba, Nebosja Veljkovic. Jógvan H. Samuelsen, ið er kendur fyri síni avrik við SÍF og HB fyrrapartin av nítiarunum, roynir seg aftur í 1.deild við egnu vágamonnum.

Pólverjin Maciej Mariniak skoraði seks mál fyri ÍF við Piotr Krakowski sum venjara í landskapping-98. Nú, nærum tvey ár eftir er álopsleikarin aftur sameindur við gamla venjaran hjá sær, hesaferð í B36, har Piotr Krakowski hevur ábyrgdina av 2.deildarliðnum, umframt at hann hjálpir Per Olavi Andersson at venja tað besta liðið.

Tá ið Darius Magdisauskas fór til B36, tók hann fólk flest á bóli, men ikki litaviska venjaran hjá FS Vágum Kestutis Latoza

Uttan at drála, bjóðaði fyrrverandi litaviski landsliðsmaðurin einum leikara afturat til Føroya. Sóstatt bleiv Igoris Kirillovas tann einasti spildurnýggi leikarin í føroysku 1.deild aftur summarsteðgin. Hann økti eisini útlendsku umboðan í bestu deildini til 30 leikarar.

Hesin Kirillovas er als ikki hvør sum helst. Millum 1991 og 1998 hevði hann spælt ikki færri enn 27 altjóða landsdystir fyri Litava, millum annað í HM- og EM-undankappingum, og eisini hevur hann skorað tvey mál. Eisini hin umstríddi Darius Magdisauskas hevði einaferð roynt seg á litaviska landsliðnum, men tað var so langt síðani sum í 1991. Vit kunnu leggja afturat, at ein annar litavi hjá FS Vágum, Zilvinas Zudis, hevur tveir landsdystir á baki. Hann royndi seg á altjóða stigi í 1996.

IE

**Nýggir leikarar í 11. umfari**

| leikari | felag | seinast í 1.deild |
|---|---|---|
| Maciej Mariniak | B36 | 1998 (ÍF) |
| Oleif Joensen | B68 | 1999 |
| Allan Mørkøre | HB | 1999 |
| Allan Joensen | KÍ | 1998 |
| Nebosja Veljkovic | Sumba | 1999 |
| Hegga Samuelsen | FSV | 1997 (HB) |
| Igoris Kirillovas | FSV | nýggjur |

# Blíðir vertir

*Úrtøkan hjá liðunum, sum um vikuskiftið royndu seg á útivølli, var óvanliga góð*

Tað hendir ikki so sjáldan í føroyskum fótbólti, at gestalið fáa fleiri stig burturúr einum landskappingarumfari, enn heimalið. Tað er tó meira sjáldan, at gestir eru so nógv sterkari, at teir vinna fýra av fimm dytum.

Undanfarna vikuskifti vóru tað tó bert , sum fóru stialeysir heim aftur, meðan B68, HB, VB og GÍ einki lótu eftir sær, tá teir vitjaðu í ávíkavist Havn, Klaksvík, heima á Sandi og í Sumba. Í 1999 megnaðu gestir einaferð at vinna fýra dystir í einum degi. Úrslitini tann 15.august í 12.umfari vóru ta ferðina hesi: B68-Sumba 3-1, ÍF-B36 1-4, B71-NSÍ 2-3, VB-GÍ 1-3, HB-KÍ 1-2.

Vit kunnu hervið staðfesta, at teir reyðu og svørtu úr HB hevndu KÍ fyri eitt dramatiskt tap heima á Gundadali fyri einum ári síðani, tá Kurt Mørkøre í seinastu minuttunum av seinasta dysti sínum fyri KÍ skoraði sigursmálið hjá.

Tann sigurin hjá norðoyingunum var rættuliga avgerðandi fyri, at meistaraheitið-99 endaði í Klaksvík. Tað er ikki ósannlíkt, at søgan endutekur seg á ein annan hátt í ár - hesaferð til fyrimunar hjá HB.

IE



*Seinast tað kom fyri, at útilið vunnu fýra av fimm dystum í einum umfari, var, tá Kurt skeyt minniliga 2-1 málið móti HB. Sunnudagin fekk HB sagt takk fyri seinast*

# AB styrkir um hópin

*Móstøðuliðið hjá B36 hevur fingið í lag leigusáttmála við ungan russiskan leikara*

JÁKUP MØRK

Fyrrakvøldið eydnaðist danska AB, sum B36 skal royna seg ímóti hósdagin, at fáa í lag leiguavtalu við PSV Eindhoven.

### Russiskt stjørnuskot

Talan er um, at AB fram til 30. juni 2001 skal læna 21 ára gamla áleyparan, Erik Kortjaguin.

Sum skilst, er talan um ein sera evnaríkan álopsleikara, sum eisini er fastur fúsur á russiska U-21 landsliðnum.

Umframt at hann nú er sáttmálabundin at hollendska stórfelagnum, hevur Erik Kortjaguin eisini verið knýttur at franska felagnum, St. Etienne.

### Skulu ansa sær

Sostatt er líkt til, at uppgávan hjá B36 gerst enn truplari, enn hon var framman undan.

At tað eydnaðist AB at avgreiða leigusáttmálan fyri midnátt týskvøldið merkir nevnliga, at felagið hevur loyvi at nýta russiska leikaran í europeiskum høpi.

Framman undan hevur AB eisini ein av vandamestu álopsleikarunum í donskum fótbólti, nevnliga nigerianska Abdul Sule.



*Líkt er til, at Tróndur Vatnhamar fær enn meira at hugsa um, nú AB hevur styrkt um álopspartin á liðnum*